# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein miðbýur í dvala

Miðbýurin í Havn er stein deyður... Hetta var ein av niðurstøðunum á kjakfundinum í Miðlahúsinum mánakvøldið, har boðið var til aðalorðaskifti um miðbýin í Havn. Kjakast varð dúgliga, og meiningarnar vóru sum vera man nógvar.

Vit kunnu bara staðfesa, at støðan ikki er góð, og so kunnu vit hugleiða út frá hesum, hvussu hetta kann bøtast.

Tórshavnar kommuna hevur sjálvandi tann størsta leiklutin í hesum, tí tað er kommunan, sum leggur karmarnar. Eitt positivt stig hevur kommunan tikið, sum hon eigur stórt rós fyri, og tað er tann ókeypis busskoyringin. Hetta er eitt sera skilagott tiltak – ikki minst í hesum tíðum, nú so nógv fokus er á globalu upphitingina, men eisini bara út frá einum tænastusjónarmiði.

Men kommunan átti at havt gjørt nógv meira fyri at nøra um mentanar- og handilslívið í miðbýnum. Vit kunnu tosa um byggisamtyktir og um parkeringspláss. Hetta eru smálutir í tí stóru heildini, men tað skuldi sjálvandi verið kommunan, sum kom við teimum stóru visjónunum. Hvat vil kommunan við miðbýnum? Kommunan hevur eina tekniska umsiting, sum eigur at hava fingurin á pulsinum á øllum viðkomandi økjum, og tað er so sjálvsagt, at hon eisini hevði nakrar framtíðar visjónir – eitt nú um miðbýin í Havn. Men tá tað kemur til hetta, so er kommunan knapt so visjoner og professionell, sum vit vildu havt hana.

Men miðbýurin er annað enn handilsgøturnar kring Vaglið, tí SMS er so sanniliga eisini ein miðbýur í Havn. Í teirri stóru visjónini hjá Tórshavnar Býráð var tað so upplagt at gjørt uppskot um, hvussu vit kunnu knýta hesar miðdeplarnar saman, til gangs fyri báðar partar – og okkum øll.

Vit skulu ikki á hesum stað koma við patentloysnum uppá, hvussu vit kunnu bøta um veðrið og parkeringsviðurskiftini – og harvið atkomiligheitina til handlar og virki í miðbýnum, men tað eru nógvir møguleikar.

Okkara tilmæli til Tórshavnar kommu skal vera: Setið pengar av til eina hugskots- ella arkitektakapping um, hvussu vit nøra um miðbýin soleiðis, at handilslívið nørist, at mentanarlívið nørist, at fólk tíma og kunnu búgva har, og soleiðis at fólk tíma at koma har. Tá skal miðbýurin nokk vakna úr dvala.

**Sosialurin**

## Býráðið í Havn eigur æruna

**BERGUR WARDUM**



Viðmerkingar til greinina hjá Gilla Trónd, býarfrøðingur, "*Hvussu miðbýðurin kann betrast*", í Sosialinum nr 109, síða 26-27, dagfesting 10.6.2008.

Sum ánari av Dr Jakobsengøta 17-19 skal eg gera vart við, at tað er byggimynduleikin, ið eigur æruna av hesi støðu, og í hesum sambandi verður Heðin Mortensen, borgmeistari, endurgivin, frá eykabýráðsfundi tann 4.9.01. kl 1400 í sambandi við verkætlanina Dr Jakobsens-/Sverisgøta:

*"-at ognirnar Dr Jakobsengøta 15,17,19 og 21 ikki skuldi fáa størri byggifrælsi, og at eingin sleppur at gera nakað við ognirnar.*"

Ávísast skal, at eg ikki havi fingið loyvi til at ríva ognina niður og at byggja annan bygning. Málið byrjaði í 2001, tá eg søkti um byggiloyvi, og varð málið kært til Innlendismálaráðið, ið avvísti kæruna, og soleiðis varð eg tvungin til at leggja málið fyri "*Retten på Færøerne*". Tann 23.4.07 varð dómsviðgerðin slitin, og málið útsett. Dómsviðgerðin er enn ikki tikin upp aftur, tí tað ber snøgt sagt ikki til at geva Tórshavnar Kommunu og Innlendismálaráðnum viðhald í:

"*at teir skulu verða fríkendir fyri at geva mær byggiloyvi sambært galdandi byggiviðtøkum*".

At hugsa sær, at Tórshavnar Kommuna og Innlendismálaráðið krevur at fáa viðhald í Rættinum í at døma ein borgara til, at hann ikki skal verða viðgjørdur eftir galdandi lóg og viðtøkum, og tí legði Rætturin eina kalda hond á málið, skiljið tann sum skilja vil, men her luktar ikki væl.

Kommunan hevur veitt alt grundvatnið í Dr Jakobsengøtu inn undir mína ogn, ið hevur viðført so mikið stóran skaða á ognina, at tað lønar seg ikki, at gera nakað við ognina.

Varð málið avgreitt sambært galdandi byggiviðtøkum, so var handilsbygningur (sum sæst á myndini) bygdur ímillum eldmúrarnar hjá grannunum.

Ein opin glassíða ímóti vegnum, ið hevði viðført, at handilsbygningurin og handilsgøtan fella væl inn í hvørt annað við eini"*penthausresturatión*" við hesum góðum útsýni, sum eisini sæst á myndini.

Innan sama grundumráðið fekk Tryggingarfelagið Føroyar byggiloyvi at samanbyggja bygningarnar á Kongabrúnni - og upp í sjey hæddir við maskinrúmi til lyft. Byggiloyvið varð undirskrivað av táverandi formanni fyri byggi- og býarskipanarnevndini, Heðin Mortensen, ið hevði fulltíðarstarv hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, og sum sat í yvir 70 nevndum og á tingi, ið staðfestir, at hann ikki var annað enn ein "l*obbyistur*" á lønarlistanum hjá Tryggingini og uttan iva við egnum skrivara, um Heðin Mortensen skuldi náa at røkja øll síni álitisstørv, og sigur hetta so mikið, hvussu Tryggingin fekk sítt byggiloyvi.

Tað skal upplýsast, at apríløgan um, at bátahylurin á Eystaru Vág skuldi gerast til støðupláss, í veruleikanum ikki var ein apríløga, men ein partur av verkætlanini hjá Tryggingini at tryggja hálvtannaðhundrað starvsfólkum hjá Tryggingini støðupláss, annars eigur Tryggingin einans eitt støðupláss.

Lobbyvirksemið hjá Heðin Mortensen, borgmeistara, sær út til at vera víðkað til at umfata verkætlanina Stórutjørn hjá Jákup á Dul Jacobsen, ið er barndómsvinur hjá Gunnar í Liða, tryggingarstjóra, við teimum fylgjum, at handilslívið í miðbýnum fyrireikar seg at flyta niðan í Hoyvík og úti á Boðanes, og verður miðbýðurin tá at síggja út sum ein spøkilsisbýur í besta Westernstíli, og stendur henda støða við, verið eg at teljast millum tey fyrstu, ið fara at negla brettir fyri vindeyguni, tí her er einki annað at gera, soleiðis sum leikur er farin fram.



*Ovasta myndir vísi útsýni, sum Bergur Wardum ímyndar sær av eini "penthouse matstovu" ovast á húsinum á skitsuni niðanfyri. Niðasta myndi vísir húsini í Dr. Jacobsensgøtu 17, sum ikki júst eru nakað prýði. Uttast høgrumegin sæst bygningurin hjá Tryggingini á Kongabrúnni*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.